# Tølini tala

**Vit gera eina roynd at greiða frá verkfallinum í tølum. Hesaferð eitt sindur rættari**

VERKFALL
*Heri á Rógvi*



*Semjan á privata arbeiðsmarknaðinum gevur mest í longdini til verkafólkið*

Í síðstu útgávu av Sosialinum umrøddu við semjuna á privata arbeiðsmarknaðinum. Vit settu eisini nøkur tøl í blaðið, men tíðanverri eru ymisk tøl, sum ikki samsvara, komin í blaðið. Tískil seta vit hesi í av nýggjum.

Tølini siga okkum so mikið, at nýggi sáttmálin gevur eina lønarhækkan áljóðandi 9,33%, t.e. vøksturin av tímalønini í gamla sáttmálanum í mun til frá 1. mai 2004.

Men seta vit hetta upp ímóti semingsuppskotinum, ið skilti partarnir, áðrenn verkfallið byrjaði 8. mai, so hava arbeiðarafeløgini sum so ikki vunnið so nógv.

Útrokningar vísa nevniliga, at – roknað útfrá grundlønini einans – at seminigsuppskotið, og harvið eingin missur orsakað av verkfalli, hevði givið 8.304,7 kr. meira í løn yvir tvey ár. Í hesum verða verkfalspengarnir ikki roknaðir við. Siga vit, at verkfallið vardi í seytjan dagar, so skuldi verkfallið givið 10.146,7 kr., og sostatt einki hall. Hetta er peningur, limirnir hava goldið inn av skattaðu løn sínari, og sum teir nú fáa út, og aftur skulu gjalda skatt av.

Útrokningar eru gjørdar útfrá grundløn einans – við ongum viðbótum ella aðrar meirinntøku.

Roknað verður við 250 arbeiðsdøgum um árið minus 25 frídagar, og harvið 225 arbeiðsdagar í alt. Gingið verður útfrá, at fólk nýta allar sínar 25 frídagar í hesum sáttmálaárinum og komandi sáttmálaári. Hetta tal kann tilsavarandi verkfallinum vera tveir dagar minni, og harvið veksur inntøka og tapið minkar tilsvarandi.

## Fakta

| | |
|---|---|
| **Gamli sáttmálin** | |
| Tímaløn | 92,20 |
| Frítíðarløn | 11,06 |
| Eftirløn | 3,32 |
| Útgoldin tímaløn | 106,58 |
| Dagsløn | 852,67 |
| Vikuløn | 4.263,33 |
| Ársløn | 191.849,76 |
| Sáttmáli 1. árið | |
| Tímaløn | 96,50 |
| Frítíðarløn | 11,58 |
| Eftirløn | 3,47 |
| Útgoldin tímaløn | 111,55 |
| Dagsløn | 892,43 |
| Vikuløn | 4.462,16 |
| Ársløn | 185.625,86* |
| Sáttmáli 2. árið | |
| Tímaløn | 100,80 |
| Frítíðarløn | 12,10 |
| Eftirløn | 3,63 |
| Útgoldin tímaløn | 116,52 |
| Dagsløn | 932,20 |
| Vikuløn | 4.660,99 |
| Ársløn | 209.744,64 |
| *Frádrigið dagar í verkfalli | |
| Samlaði lønarvøksturin | 9,33% |

# Nógvir týskarar í Føroyum

**Í sambandi við dystin mikudagin er rættilig innrás av týskarum í Føroyum**

DYSTUR
*Heri á Rógvi*

Við Norrønu í mánamorgun vóru upp ímóti 500 týskarar við umborð.

Hetta upplýsir Áki Jespersen, ferðafólkaleiðari hjá Smyril Line.

Ikki allir eru fótbóltsáskoðarar, tí nógv eru á veg til Íslands, men ein fittur partur er kortini komin til dystin, verður hildið, men langt frá øll. Norrøna var stúgvandi full á túrinum úr Hanstholm, og hon verður somuleiðis full til Íslands í dag. Ein partur av áskoðarunum fara avstað við Norrønu.

### Fleiri flogfør

Eisini nógvir týskarar koma til landið loftvegis.

Finnbogi Niclasen, stjóri á Flogvøllinum í Vágum, sigur, at týsdagin og mikudagin koma fimm flogfør úr Skotlandi og eitt kemur beinleiðis úr Frankfurt. Flogførini koma bæði úr Aberdeen og Edenburgh.

Týskland spældi leygardagin javnleik móti Skotlandi, og týska liðið, fjølmiðlafólk og áskoðarar koma tískil fyri ein part haðani frá.

Umleið 550 fólk í alt skulu ferðast til og frá flogvøllinum í Vágum í sambandi við dystin - umframt regluligu rutuflogførini.

Fyri flogvøllin í Vágum er hetta ein stór avbjóðing, tí fleiri flogfør skulu steðga á í Vágum, og hetta ger, at tey mugu toyggja seg tað, tey megna, fyri at hýsa øllum.

Og í Vágum verður satsað upp á, at veðrið verður gott, soleiðis at øll flogførini megna at lenda.

Umleið 750 týskarar hava í alt atgongumerki til dystin, men líkt er til. Fleiri týskarar eru komnir til landið uttan atgongumerki, greiða týsk viðhaldsfólk frá. Men hvussu stórt talið er, veit eingin at siga við vissu.



*Týskarar streyma til landið í hesum døgum. Líkt er til, at gestirnir verða sjónligir á Tórsvølli*

35 ára útsøla

Í samband við at 35 ár eru liðin síðan Vatnsoyra Snikkaravirki byrjaði, vilja vit selja 135 vindeygu og hurðar rættuliga bíliga.

Vit hava sett 4 ymisk tilboð upp, sum øll vísa á talið 35, sí niðanfyri:

1. Vit selja nøkur stk. fyri kr. 35,-
2. Vit lata 65% í avsláttri so vit hava 35% eftir
3. Vit lata 35% avsláttur av nøkrum stk.
4. Vit selja nøkur stk. fyri kr. 35hundrað

Far inn á heimasíðu okkara www.h-window.fo og hygg eftir útsølulistanum.

Vatnsoyra Snikkaravirki pf.

VARPIÐ
Skráir og ummælir
Hvønn fríggjadag
20 síður heft, - so tað heldur alla vikuna
SvF • DR1 • DR2 • BBC Prime • Canal+ • Canal+ Gul • Canal+ Blá TV • Danmark 1 • TV Danmark 2 • 3+ DK 4 • TV 1000 • TV3 dk • Animal Planet • BBC World • CNN • Cartoon Network • Discovery Channel Euro Sport • MTV • National Geographic • TCM • Travel Channel • VH1 • TV2 Zulu • GOD Channel • Lindin • Útvarp Føroya • Rás 2



# Mexico farið undir bankan

**Føroya Banki hevur keypt økið, ið gongur undir navninum Mexico, sum liggur miðskeiðis í Havn. Hvørjar ætlanir bankin hevur, vil stjórin ikki upplýsa**

HAVNIN
*Ingi Rasmussen*



*Mexico lá uttan fyri lóg og rætt. Nú liggur tað beint við eina høvuðsæðr í Tórshavn, og tí hevur Føroya banki keypt*
*Mynd: Jens K. Vang*

Hví tað eitur Mexico, er okkum ókunnugt. Kanska er tað tí, at eyðkendi garðurin einaferð lá eitt fitt petti uttanfyri Havnina. Uttan fyri lóg og rætt.

Nú liggur Mexico mitt í tí pulserandi høvuðsstaðnum. Beint við eina høvuðsæðr, R.C. Effersøesgøtu, tætt við ítróttardepilin Gundadal, ídnaðarøkið á Hálsi og íbúðaøkið Konmansmýru. Tí er tað ikki so løgi, at stórur áhugi hevur verið fyri at keypt Mexico.

Føroya Banki hevur nú keypt gamla bóndagarðin og hagastykkið mitt í Havnini, váttar Janus Petersen, stjóri í Føroya Banka.

Talan er um einar 25.000 fermetrar. Mexico fevnir um tað ódyrkaða økið, sum røkkur frá sjálvum garðinum, suður til høvuðsskrivstovuna hjá Føroya banka við SMS og eystur ímóti Konmansmýru.

Hetta er eitt gott stykki, og spurningurin er, hvørjar ætlanir bankin hevur við tí.

– Vit hava onkrar ætlanir, men tær eru ikki ítøkiligar, og tí fara vit ikki út við teimum enn, sigur Janus Petersen.

Føroya Banki hevur tveir høvuðsbygningar í høvuðsstaðnum, og ongar ætlanir eru um at fara úr teimum, leggur stjórin dent á. Hann vísir samstundis aftur, at ætlanin er at fara undir íbúðabygging ella aðra bygging.

Spurdur, um tað er rætt av Føroya banka at leggja jørð inn undir seg miðskeiðis í Havnini, har plásstrot er frammanundan, vísir Janus Petersen hesum aftur.

– Vit hava ongan áhuga at leggja inn undir okkum. Tvørturímóti hava vit gjørt tað øvugta. Vit hava ikki viljað átt, og tí hava vit selt fleiri ognir síðstu árini, millum annað eina trøð á Argjum. Eftirhondini eiga vit næstan onki. Tú kanst kanska siga, at talan er um eina íløgu, tí vit hava keypt fyri at síggja, hvørjir møguleikar liggja í hesum, men vit leggja ikki inn undir okkum, sigur Janus Petersen.

Bankastjórin vil ikki siga, hvussu nógv bankin hevur latið fyri Meksiko. Tað er ein upphædd, sum liggur millum bankan og seljaran, sigur hann. Eitt tal, sum er komið Sosialinum fyri oyrað, er 12 milliónir krónur. Men tað vil Janus Petersen hvørki vátta ella avsanna.

# Stóri flytidagur hjá løgtinginum

**Løgtingsskrivstovan flytir nú niðan á ovastu hædd í hjábygninginum hjá Føroya løgtingi. Á ólavsøku verður fyrsta byggistig í ætlanini at byggja gamla Telefonverkið um til Løgtingið væntandi liðugt**

FLYTING
*Ingi Rasmussen*



*Snotuligt sær tað út á ovastu hædd, har Løgtingsskrivstovan nú flytir inn*
*Mynd: Jens K. Vang*

Mánadagin fór Løgtingsskrivstovan undir at flyta í síni nýggju høli, sum eru á ovastu hædd í húsinum, har Telefonverkið áður helt til.

Enn er bara ovasta hæddin liðug, har sjálv Løgtingsskrivstovan skal halda til. Súsanna Danielsen, stjóri á Løgtingsskrivstovuni, sigur, at væntandi verður alt liðugt á ólavsøku. Hon er væl nøgd við umstøðurnar, sum tær síggja út.

Gamli bygningurin hjá Telefonverkinum, sum nú verður bygdur um, skal vera til umsiting og annað hjá løgtinginum. Á aðru hædd vera fundarhølini hjá løgtinginum og á fyrstu hædd fáa tingmenn einar 70 fermetrar til uppihalds, og køkur er eisini á tí hæddini. Kjallarin hevur higartil verið brúktur til uppihaldsstovu hjá tingmonnum, men nú teir fáa betri umstøður, verður kjallarin bert brúktur til klædnagoymslu. Ovastu hæddina, tað er triðja hædd, fær Løgtingsskrivsstovan alla, sum hon er.

Hetta er kortini bara fyrsta byggistig í tí stóru ætlanini at geva løgtinginum nýggjar karmar. Føroya Tele kemur framvegis at halda til í norðaru helvtini av bygninginum, og sambært ætlanini, sum er stungin út í kortið, verður húsið ikki heilt liðugt til Føroya løgting fyrr enn í 2005. Tá skal Føroya Tele vera úti við øllum sínum útbúnaði. Til ta tíð hava løgtingsmenn eisini fingið hvør sína skrivstovu at húsast í.

Enn er útsíðan á umsitingarliga partinum av løgtingshúsinum ikki liðug, men ein hóming fæst av endaligu útsjóndini við at hyggja at ovastu hæddini. Vindeyguni vera tey somu í teimum niðaru hæddunum og bæði tornið og millumbygningurin, sum partvíst er úr glasi, hava eisini fingið sítt endaliga skap.

Tað er Heidi Andreasen arkitektur, sum hevur staðið fyri at geva løgtinginum nýggja útsjónd og umstøður. Hon vann upprunaligu arkitektakappingina um nýggj løgtingshús, sum kortini ikki vann frama av politiskum ávum.

Løgtingsskrivstovan hevur síðstu árini hildið til í bygninginum hjá gomlu Dimmu í Erling Jalsgøtu.

# Bioanalytikarar hava fingið nýtt merki

BÚMERKI
*Ingi Rasmussen*

Føroyskir bioanalytikarar hava fingið nýtt búmerki, sum Hildigunn Heinesen hevur gjørt. Tað er avgjørt á limafundi hjá felagnum fyri føroyskar bioanalytikarar.

Nýggja merkið er ein fimmhyrningur á grøna bakgrund, har tað stendur bioanalytikari undir. Merkið er úrslit av einari búmerkjakapping, sum felagið fyri bioanalytikarar í Føroyum skrivaði út. Bara eitt uppskot kom inn til kappingina, men felagið helt uppskotið vera so mikið gott, at nevndin gjørdi av at arbeiða víðari við tí.

Hildigunn Heinesen átti uppskotið. Hon hevur lagt dent á fimmhyrningin, sum skal ímynda sergreinar hjá bioanalytikarum. Sergreinarnar eru klinisk biokemi, klinisk immunologi, klinisk mikrobiologi, klinisk fysiologi/-nuklearmedisin og klinisk patologi/-histologi.

Felagið hjá bioanalytikarum, áður nevndir laborantar, hevur gjørt av, at bara tey, sum hava útbúgving sum bioanalytikarar, kunnu nýta merkið. Tey, sum eru limir í felagnum, fáa tað í gávu.




*Nýggja merkið hjá føroyskum bioanalytikarum*